

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 10 - 2013

# Spógvi steðgar vindmylnu-verkætlan í Hetlandi

Ein vindmylnuverkætlan fyri fleiri milliardir kr. í Hetlandi er steðgað fyribils av rættarskipanini í Skotlandi. Orsøkin: eitt sjáldsamt spógvaslag. Ætlanin hjá Viking Energy at gerast ein tann største vindmylnulundin í heiminum kann nú enda sum ein tekning á arbeiðsborðinum. Ein dómstólur í Edinburgh hevur staðfest, at at tann risastóra vindmylnuverkætlanin í Hetlandi skal útsetast, til nærri umhvørviskanningar eru gjørdar. Verkætlanin hevur leingi staðið fyri skotum frá lokalum umhvørvisfólki, tí hon skal gerast í einum viðhvomum náttúruøki. Økið er samtíðis einasta reiðrarpláss hjá einum sjáldsomum spógvaslag. Kortini hevur felagið aftanafyri verkætlanina fingið loyvi at arbeiða víðari við projekteringini. Ein avgerð, sum mótstøðufólk á staðnum hava kært víðari og nú fingið viðhald í frá dómstóli í Edinburgh. Í avgerð síni sigur dómstólurin, at man í upprunaliga loyvinum til Viking verkætlanina hevur gloymt at fylgja einum EU direktivi um fugl. Haraftrat leggur dómstólurin dent á, at Viking Energy enn ikki hevur fingið loyvi at framleiða orku, sum ger støðuna hjá felagnum verri løgfrøðiligha sæð. Tað er eitt veruligt skot fyri bógvin fyri Skotland at framleiða sína egnu orkunýtslu frá varandi orku í 2020, um Viking verkætlanin nú verður av ongum. Henda ætlan hevur longu kostað nógv, og hon er ein týðandi partur av heildarætlanini fyri alt Skotland. Um somu tíð kann avgerðin hjá dómstólinum fáa avleiðingar fyri aðrar vindmylnuverkætlanir í Bretlandi, har náttúruverja gerst meira týðandi partur av avgerðunum. Viking ætlanin fevnir um 103 myllur við møguleika at framleiða millum 370 og 457 MW. Ætlanin skuldi setast í verk í 2018. Kelda: EnergyWatch og Shetland Times

